Kristina Háfoss
Høgni Hoydal
Sirið Stenberg
Bjørt Samuelsen
Beinta Løwe Jacobsen
Hervør Pálsdóttir
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya
(Fylgilóg til skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 82 frá 7. juni 2011 um Búskapargrunn Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 23. desember 2011, løgtingslóg nr. 131 frá 20. desember 2016, og løgtingslóg nr. 46 frá 30. apríl 2018, verður í § 3 sum stk. 6 sett:

"*Stk. 6.* Inntøkur grunsins frá flyting av fíggjarlóg landsins, ið stava frá skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini, kunnu flytast úr grunninum til donsku stjórnina."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at geva heimild til, at inntøkur í Búskapargrunni Føroya frá flyting av fíggjarlóg landsins, ið stava frá skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini, kunnu flytast úr Búskapargrunni Føroya til donsku stjórnina.

Hetta lógaruppskot er ein fylgilóg til uppskot til løgtingslóg um skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini.

Endamálið við lógaruppskotunum í felag er at gera føroyska búskapin sjálvberandi, og at Føroyar gera egna skiftisskipan, tá umræður at gera føroyska búskapin og føroysku fíggjarlógina óheft av donsku ríkisveitingini.

Hetta verður gjørt við at knýta inntøkuvøkstur landsins og minking av ríkisveitingini á fíggjarlóg landsins saman.

So hvørt inntøkur landsins vaksa, fara 50% av inntøkuvøkstrinum til at minka ríkisveitingina á fíggjarlógini, meðan 50% av inntøkuvøkstrinum verða verandi á fíggjarlógini.

Ríkisveitingin kann verða minkað, so hvørt meira verður flutt av fíggjarlógini yvir í Búskapargrunnin, men kann eisini minkast meira, um ynski er um hetta.

Í seinasta lagi tað árið, tá flutt verður upphædd svarandi til tað, ið ríkisveitingin var í 2020 áljóðandi 641,8 mió. kr., skal Føroya landsstýri – sambært lógaruppskotinum um skiftisskipan – boða donsku stjórnini frá, at ríkisveiting ikki verður móttikin.

Við hesum uppskoti til skiftisskipan verða føroyski búskapurin og landsins fíggjarlóg óheft av donsku ríkisveitingini eftir ávísum áramáli.

Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Hetta lógaruppskot er fylgilóg til uppskot til løgtingslóg um skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini. Við hesum báðum lógaruppskotum fer landsins fíggjarlóg miðvíst at gerast óheft av donsku ríkisveitingini. Hetta hendir samstundis, sum samlaðu inntøkurnar á fíggjarlógini framhaldandi vaksa í tíðarskeiðnum, ið skiftisskipanin er galdandi.

Ríkisveitingin á fíggjarlóg landsins minkar við tí, ið svarar til 50% av vøkstrinum í inntøkunum á fíggjarlóg landsins. Sostatt fer netto 50% av inntøkuvøkstrinum at vera á fíggjarlóg landsins í tíðarskeiðnum, tá ríkisveitingin verður minkað á fíggjarlóg landsins.

Ríkisveitingin er í dag fastfryst krónuupphædd á 641,8 mió. kr.

Við inntøkuvøkstri sum mett í fíggjarlógini fyri 2021 og 4-5% eftir hetta, minkar ríkisveitingin millum 67,3 mió. kr. og 150,5 mió. kr. árliga komandi 6 árini.

Tann parturin av ríkisveitingini, ið verður minkaður, verður á hvørjum ári fluttur í Búskapargrunn Føroya. Upphæddin kann verða flutt víðari til donsku stjórnina. Verður upphæddin ikki flutt víðari til donsku stjórnina, og við omanfyrinevndu fyritreytum, so økist uppsparingin í Búskapargrunni Føroya við 2,3-2,7 mia. kr. umframt rentum av hesum komandi árini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at uppskotið bert hevur smávegis umsiting við sær.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður, at uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður, at uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið fær avleiðingar í mun til avtaluna millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina um ríkisveitingina. Henda verður gjørd fyri ávíst áramál, og fer ein skiftisskipan at hava ávirkan á, hvussu komandi avtalur verða partanna millum.

2.8. Sosialar avleiðingar
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær sosialar avleiðingar.

2.9. Markaforðingar
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki við sær gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan landsstýrismann ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið við sær aðrar avleiðingar?
Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Nýggj áseting í § 3, stk. 6 heimilar, at inntøkur grunsins frá flyting av fíggjarlóg landsins, ið stava frá skiftisskipan at gera fíggjarlóg landsins óhefta av ríkisveitingini, kunnu flytast úr grunninum til donsku stjórnina.

Til § 2
Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2021.

Á Løgtingi, 19. januar 2021

Kristina Háfoss	Høgni Hoydal	Sirið Stenberg
Bjørt Samuelsen	Beinta Løwe Jacobsen	Hervør Pálsdóttir